# Elin Olsen framsýning í Galleri Blå



**Leygardagin 26. nov. var fernisering á Galleri Blå, Blågårdsgade, í Roskilde í samband við Elin Olsen, læt eina framsýning upp við oljumálningum, har myndevini eru kvinnur og menn.**

Talan er um fyrstu framsýningina hjá Elini, sum fær sera góð ummælir.

Elin Olsen er 33 ára gomul. Hon er føroysk, dóttir Ruth Sørensen og Árna Olsen. Sum barn og tannáringur búði hon í Klaksvík, men seinnu árini hevur hon búð í Danmark, har hon m.a. hevur fingið undirvísing í tekning og málningalist.

Framsýningin er opin til 16 desember.

# Ferðslutrygd átalar framferðina í Løgtinginum

**Ráðið fyri Ferðslutrygd heldur tað vera skilaleyst, at sakkunnleikin ikki er hoyrdur, innan Føroya Løgting viðgerð uppskot til samtyktar um broytingar í hámarksferðini fyri prutl. - Skilaleyst – serstakliga tá hugsað verður um, at bara í hesum árinum hava ferðsulvanlukkur á prutli kravt trý ung mannalív, sigur Rúna Sivertsen frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLUTRYGD
*dagfinn@sosialurin.fo*

- Tað var bert av tilvild, at Ráðið fyri Ferðslutrygd frætti um hetta uppskotið, sum kemur til 2. viðgerð á Føroya Løgtingi týsdagin. Málið snýr seg um at flyta hámarksferðina hjá prutlum frá 30 km/t til 45 km/t. Men hvørki Løgreglan, Akstovan ella Ráðið fyri Ferðslutrygd eru hoyrd í hesum máli ella eru biðin um at koma við viðmerkingum til uppskotið, vísir Rúna Sivertsen á.

- Ferðslutrygd hevur mælt til at seta hámarksferðina hjá prutlum upp, treytað av, at undirvísing verður sett í verk samstundis. Tó eru onnur viðurskifti í uppskotinum, sum sakkunnleikin ivaleyst fer at ráða tinginum frá at samtykkja. Í Føroyum doyggja nógv fleiri í ferðsluni enn í okkara grannalondum – hetta hava vit gjørt vart við og endurtikið í tað óendaliga. Men tað er sum at sletta vatn á gás! Framvegis taka tey ráðandi ikki ferðslutrygdina í álvara, men lata eitt slíkt mál av hondum, uttan at tryggja sær neyðugu vitanina, sigur Rúna Sivertsen, sum heitur á Føroya Løgting um at beina málið aftur í nevnd, so sakkunnleikin verður hoyrdur, innan málið verður samtykt.

Visti tú ikki tað? Sosialurin

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Ljósviðgerð



Kennir tú teg troyttan? · Hevur tú brúk fyri meira svøvni?
Er tað ringt at koma upp um morgunin?
Ert tú illa upplagdur? · Ert tú erkvisin?
Manglar tú orku? · Hevur tú eina søta tonn?

**Kanska skuldi tú roynt lampuna til ljósviðgerð**

Serliga um heystið og um veturi n ynskja vit meira ljós. Mangul uppá ljós gevur ofta eina kenslu av dapurleika, manglandi orku og mótloysi og kann eisini geva eina nógv økta trongd til søtt. Hetta verður ofta nevnt tunglyndi. 5-6% líða av tunglyndi og nógv fleiri eru vetrartroytt.

Gransking vísir at LJÓSVIÐGERÐ kann hjálpa teim flestu (70-75%) av við vetratroyttheit/tunglyndi.

Ljósviðgerð 1/2 til 1 tíma dagliga (best um morgunin) er í teim flestu førum nokk. Ímeðan tú fært ljósviðgerð kanst tú t.d. eta morgunmat og/ella lesa eitt blað.

Sum oftast merkist innan 14 dagar um ljósviðgerðin hjálpir.
Les meira um tær lampur vit hava at selja og um gransking av ljósviðgerð á okkara heimasíðu www.ergo.fo undir LJÓSVIÐGERÐ.

Ergo & Hjálpartól - alt innan hjálpartól - ergo.fo

J.C. Svabosgøta 8 • FR-100 Tórshavn
Tel. 315 777 • Fax 315 772 •Fartel. 215 778
Teldupost: ergo@post.olivant.fo • Heimasíða: www.ergo.fo

Sosialurin 341800

FÆST UM ALT LANDIÐ




Ein hent jólagáva

SKIPALISTIN **hevur lógarkravdan** føroyskan álmanakka